Valuta og amerikansk fíggjarlóg:

# Euro, dollars og amerikanskt fíggjarlógarcirkus

**Báðu megin Atlantshav merkist tann óvanliga høgi oljuprísurin**

VALUTA
*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*

Vikan hevur ikki givið nakrar klárar ábendingar um, hvønn vegin rákið gongur í lutfallsligu styrkjuni hjá teimum báðum størstu valutaeindunum, dollars og euro. Høvuðsproblemini eru framvegis tey somu. Amerikanski búskapurin er í góðum vøkstri og registreraða arbeiðsloysistalið er rættiliga lágt, gott 5 %, og hevur lækkandi tendens. Men aftanfyri liggja "the twin deficits", risahall bæði á landshúsarhaldinum og á handils- og gjaldsjavnváginum.

Vøksturin í flestu londunum í Europa harafturímóti er lágur og arbeiðsloysið er høgt. Men stóra landið Týskland, við 80 mill. íbúgvum, hevur stórt avlop á handilsjavnváginum. Vøksturin í BNP í Týsklandi var í fjør bert 1,5%. Men nýggjastu tøl fyri 1. ársfjórðing í ár í Týsklandi vóru nakað hægri enn væntað, 0,7% fyri árfjórðingin.

## Oljan trýstir prísirnar upp

Báðu megin Atlantshav merkist tann óvanliga høgi oljuprísurin. Ein orsøkin til henda príshækking er, at ein nýggjur búskapur, Kina, hesi seinnu árini hevur tikið seg fram, og er ein nýggjur keypari av olju á heimsmarknaðinum, kar Kina til fyri fáum árum var seljari. Sí grein um Kina aðrastaðni á Vinnusíðunum. Høgi oljuprísurin ger bæði vørur og tænastur dýrari. Flogferðaseðlar og benzin til bilar hækka í prísi. Sama ger prístali, og tað merkir at inflatiónin kann vinda uppá seg.

Eitt høvuðsmál bæði hjá Euro-bankanum, ECB, og hjá amerikanska landsbankanum, the Fed, er at hava lága inflatión. Men vindur inflatiónin uppá seg, kunnu hesir báðir bankar hækka útlánsrentuna, sum so virkar soleiðis, at færri ynskja at læna, og harvið kann inflatiónin kanska basast. ECB hevur hildið fast við eina rentu uppá 2,0% í langa tíð. The Fed hevði eina uppaftur lægri rentu í 2003, 1,0%, men frá miðjan 2004 hevur bankin hækkað sína rentu við $^{1}/_{4}$% fleiri ferðir, og hon er nú uppi á 2 $^{3}/_{4}$.

Stúring fyri hægri inflatión ger, at valutahandlarar lurta eftir hvørjum orði, sum Alan Greenspan, landsbankastjóri í USA, sigur. Men higartil hevur hann verið alt annað enn klárur.




## Er amerikanska fíggjarlógaruppskotið eitt fíggjarligt fantasifostur?

Orðini eru ikki míni, men tað er hitt kenda eingilska vikublaðið, The Economist (090405), sum fer illa við Bush, amerikanskum politikarum og teirra fíggjarpolitikki. Yvirskriftin í Economist er: *America's budget, Fiscal fantasyland.* Tá Bush var afturvaldur til forseta í november í fjør, lovaði hann eftiransni, ella disciplin, tá tað ráddi um landshúsarhaldið. Og fíggjarmálaráðharrin hjá honum, John Snow, lovaði at hallið á landshúsarhaldinum skuldi vera komið niður í helvt í 2009.

Men nú seks mánaðar seinni, sigur Economist, sýnast øll hesi lyfti at vera tóm. Lógaruppskotið frá Bush gjørdi gomlu skattalættarnar, sum tey ríku fingu gagn av, fastar ella permanentar. Nýggir skattalættar skulu koma aftrat. Men samstundis hækka útreiðslurnar mest til militerið. Einasti stóri posturin á lógaruppskotinum, sum verður skerdur, eru útreiðslur til *Medicaid*, sum umfatar heilsuhjálp til tey fátæku. Gongdin er so tann í USA, at bæði Senatið og Umboðsmannahúsið koma við teirra viðmerkingum og uppskotum, og so skal eitt felags álit skrivast, um tað er møguligt. Tey sosialu problemini í USA eru mong, men tað almenna hevur bert ein lítlan leiklut á hesum øki. Eisini tann demografiska eldra-byrðan, sum í komandi fer at vaksa av álvara, ger tað neyðugt við ymsum tiltøkum. The Economist meinar at politikkurin hjá Bush er *"fiscal delusion not fiscal discipline."* (fíggjarlig gyklaverk, ikki eftiransni) Hørð orð frá einum siðiligum riti.




